

## Fólk hugsa ikki um doping

Ben Johnsson, sum fyrstu ferð varð tikin fyri doping eftir OL í 1988, tykist ikki leggja nakað í, um stimbrandi evni verða nýtt innan ítróttina. Seinast, tá OL-gullvinnarin Justin Gatlin varð testaður positivur.

- Áskoðararnir eru líkasælir. Tey vilja síggja heimsins skjótasta mann, og tað er tað, sigur Johnson.

Tá Johnson í 1988 fóru fyrstur um málstrikuna, var hetta í tíðini, 9,83, sum fram til tá var so nógv skjótasta tíðin, sum nakar hevði runnið teir 100 metrarnar.

**-mørk**

## Carrick skal stjórna United-miðvøllinum

Manchester United og Tottenham komu um vikuskiftið ásamt um prísin fyri miðvallarn, Michael Carrick. 25 ára gamli miðvallarin hevur staðið ovarliga á ynskilistanum hjá Alex Ferguson, sum hevur tørv á nýggjum stýrimanni eftir Roy Keane, sum ikki longur er í felagnum. Upprunaliga segði Tottenham nei takk til 120 mió kr., men tá United beyð 165 mió kr., samstundis sum Carrick vildi sleppa úr felagnum, valdi leiðslan á White Hart Lane at taka av. Tottenham keypti Carrick úr West Ham fyri 30 mió kr. fyri tveimum árum síðani.

**-mørk**

# Michael Schumacher vann á heimabreytini



*Michael Schumacher er væl ávegis at eta seg heilt upp á toppin í HM-kappingini*

*Mynd: Scanpix*

**Eftir, at Kimi Räikkönen fekk trupulleikar í fyrsta pittsteðginum, líktist formil 1 koyringin einum avgreiðslu spurningi fyri Ferrari. Michael Schumacher og Felipe Massa fylgdust heilt til málstrikuna.**

FORMIL 1
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Sjeyfaldi heimsmeistarin í formil 1 Michael Schumacher skar munin upp til Fernando Alonso í kappingini um heimsmeistaraheitið niður til 11 stig, og nú liggur avgerðin um hvør verður heimsmeistari í hondunum á Ferrari og Schumacher.

Alonso koyrdi lítið sannførandi sunnudagin, og tað var einans orsakað av tøkniligum trupulleikum við Williams-Cosworth bilinum hjá Mark Webber í evstu løtu, ið gjørdi, at munurin í kappingini um HM ikki gjørdist uppaftur minni.

Eftir fleiri mánaðir í aftara enda av feltinum, tyktist Honda at vera komið fyri seg. Jenson Button hevði ongar trupulleikar við at slepp framvið báðum Renault bilunum, ið fóru framvið honum í byrjanini. Tó megnaði hann ikki at halda Kimi Räikkönen í McLaren-Mercedes aftan fyri seg, tá hesin í endanum av koyringini koma afturíaftur eftir ein truplan fyrsta pittsteðg, ið flutti hann av fremstu støðu og nógv pláss aftur.

Bíða hevur verið eftir nýggja bilinum hjá Super Aguri við nógvum spenningi. Hesin bilur avloysir 4 ára gamla Arrows bilin, ið Super Aguri hevur brúkt higartil í ár. Hetta er sostatt fyrsta ábendingin um hvussu Aguri liðið fer at klára seg í formil 1 kappingini, og tað sær ikki serliga lovandi út, tí hvørgin Super-Aguri bilur kom á mál, og nýggi koyrarin Sakon Yamamoto koyrdi bert fáar metrar.

Báðir Midlands bilarnir vóru eftir koyringina vrakaðir fyri nýtslu av fleksiblum veingjum á bilum sínum, hetta ger tó ikki nógvan mun, tí teir endaðu ávikavist aftast og næst aftast.

### Úrslitið á Hockenheim

| | |
|---|---|
| 1 Michael Schumacher Ferrari | 10 |
| 2 Felipe Massa Ferrari | 8 |
| 3 Kimi Räikkönen McLaren-Mercedes | 6 |
| 4 Jenson Button Honda | 5 |
| 5 Fernando Alonso Renault | 4 |
| 6 Giancarlo Fisichella Renault | 3 |
| 7 Jarno Trulli Toyota | 2 |
| 8 Christian Klien RBR-Ferrari | 1 |
| 9 Ralf Schumacher Toyota | |
| 10 Vitantonio Liuzzi STR-Cosworth | |
| 11 David Coulthard RBR-Ferrari | |
| 12 Scott Speed STR-Cosworth | |
| 13 Christijan Albers MF1-Toyota (vrakaður) | |
| 14 Tiago Monteiro MF1-Toyota (vrakaður) | |

### Givnir

- Mark Webber Williams-Cosworth
- Takuma Sato Super Aguri-Honda
- Jacques Villeneuve Sauber-BMW
- Rubens Barrichello Honda
- Nick Heidfeld Sauber-BMW
- Pedro De La Rosa McLaren-Mercedes
- Sakon Yamamoto - Super Aguri-Honda
- Nico Rosberg Williams-Cosworth

### HM fyri koyrarar

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Fernando Alonso | Spania | 100 |
| 2 | Michael Schumacher | Týskland | 89 |
| 3 | Felipe Massa | Brasilia | 50 |
| 4 | Giancarlo Fisichella | Italia | 49 |
| - | Kimi Räikkönen | Finnland | 49 |
| 6 | Juan Pablo Montoya | Kolumbia | 26 |
| 7 | Jenson Button | Ongland | 21 |
| - | Rubens Barrichello | Brasilia | 16 |
| 9 | Nick Heidfeld | Týskland | 13 |
| - | Ralf Schumacher | Týskland | 13 |
| 11 | David Coulthard | Skotland | 10 |
| - | Jarno Trulli | Italia | 10 |
| 13 | Jaques Villeneuve | Kanada | 7 |
| 14 | Mark Webber | Avstralia | 6 |
| 15 | Nico Rosberg | Týskland | 4 |
| 16 | Pedro de la Rosa | Spania | 2 |
| - | Christian Klien | Eysturríki | 2 |
| 18 | Vitantonio Liuzzi | Italia | 1 |

### HM fyri lið

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Renault | 149 |
| 2 | Ferrari | 139 |
| 3 | McLaren-Mercedes | 77 |
| 4 | Honda | 37 |
| 5 | Toyota | 23 |
| 6 | Sauber BMW | 20 |
| 7 | Red Bull Racing Ferrari | 12 |
| 8 | Williams-Cosworth | 10 |
| 9 | STR-Cosworth | 1 |